





# Isolatiónin varð longd



*Føroya Rættur avgjørdi mikudagin, at 30 ára gamli danin framhaldandi skal sita í isolatión í 14 dagar.*

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Føroya Rættur longdi mikudagin varðhaldsfongslingina av einum 30 ára gomlum dana í fjúrtan dagar, og hann skal sita í isolatión allar dagarnar. Maðurin er ákærdur í stóra narkomálinum, sum hevur verið ovast á breddanum síðan 16. januar í ár.

Hann varð tikin í Keypmannahavn 16. januar, og hann er síðani fluttur til Føroya, tí hann hevur samband við narkomálið her í Føroyum. Verjin hevur roynt at flyta mál hansara til Danmarkar, men hesum hevur Føroya Rættur ikki givið honum viðhald í.

Ákæruvaldið vil vera við, at hesin maðurin hevur verið við til at skipa fyri umfatandi narkosmugling til Føroya.

Rætturin hevur eisini ásett, at dómsviðgerð í hesum málinum verður 10. apríl. Ákæruvaldið fer væntandi at krevja, at málið verður viðgjørt fyri afturlatnum hurðum.

Ein annar 35 ára gamal dani var eisini í Føroya Rætti mikudagin. Hann er eisini ákærdur í narkomálinum. Ákæruvaldið kravdi í hesum sambandinum, at hann framhaldandi skal sita í isolatión, teir fjúrtan dagarnar hann hevur eftir av varðhaldsfongslingini. Málið var ikki avgjørt, tá blaðið fór til prentingar.

Ein 27 ára gamal føroyingur, sum hevur sitið í varðhaldinum síðan 16. januar, verður leyslatin ein av fyrstu døgunum. Hann er ákærdur fyri brot á lógina um euforiserandi evni, og tí kann varðhaldsfongslingin ikki leingjast longur.

# Kvinnufelagið 50 páskadag

Kvinnudagurin er nú vorðin almennur flaggdagur, og tann 8. mars varð Merkið vundið á stong fyrstu ferð í hesum sambandi.

Henda viðurkenning setur ein serligan dám á 50 ára stovningardagin, sum var í Havn 31. mars í 1952, men eisini á arbeiðið hjá hinum kvinnu.-, hús- og matmøðrafeløgunum, sum flest øll eru javngomul við Kvinnufelagið.

Eftirsum sjálvur føðingardagurin er páskadag, hevur nevndin í Kvinnufelagnum gjørt av, at halda dagin summarmáladag, tann 14. apríl í Mettustovu, við eini móttøku frá klokkan 15 til 17.

Fyri at gera dagin eitt sindur meira merkisverdan, hevur felagið millum annað givið øllum miðnámsskúlnum, hvør sítt flokssett av Kvinnutíðindum, tí seinasta sum komið er, mframt bókasavnssett til miðnámsskúlar og framhaldsskúlar í landinum.

Blaðið er fjølrboytt, og umfatar tey týdningarmestu evnini í stríðnum fyri kvinnurættindum, sum hava verið frammi í 90´unum, og eisini fyri ta tíð. Har er søguligt, politiskt og mentanarligt tilfar í 36 greinum, skrivaðar av 26 ymsum høvundur, allar prýddar við myndum.

Sum framhald av og til minnis um eitt av fyrstu stóru tøkunum hjá felagnum, so fer Kvinnufelagið í næstum at geva Landssjúkrahúsinum ein vakran útibonk, har fólk, avvarðandi at sjúkum og onnur kunnu styrkja seg onkrar løtur í morgun sól ella vesturskini við sýni út á fjørðin og oman í Sandágerði.

***-ib***


Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg



Fjarðahús
- frá dreymi til veruleika



Vestmanna Timburhandil · Tel 472 000 · vt@vt.fo · www.vt.fo